

## Vanlukkan minutt fyri minutt

| | |
|---|---|
| **Vanlukka:** | Klokkan 16:44 í gjár hendi flogvanlukkan. |
| **+1 minutt:** | Ferðafólkini, sum kunnu flyta seg eru komin út úr fremsta partinum av vrakinum. |
| **+26 minuttir:** | Tveir hjálparar av flogvøllinum koma inn við teppum. |
| **+34 minuttir:** | Brandlið kemur inn í fremsta partin av flogfarinum, og tríggir sjúklingar verða fluttir út. Rópt verður eftir strekkbøru til ungling við ryggskaða. |
| **+71 minuttir:** | Unglingi og blaðmaður verða fluttir úr vrakinum. |
| **+74 minuttir:** | Blaðmaður verður lagdur í bil. |
| **+78 minuttir:** | Blaðmaður verður lagdur á gólvið í hangarinum. |
| **+82 minuttir:** | Blaðmaður verður fluttur í tyrlu. |
| **+86 minuttir:** | Tyrla lendur á Triton við blaðmanni. |
| **+125 minuttir:** | Umleið tíð, at venjing verður endað. |

*Tað tók 78 minuttir, áðrenn seinasti sjúklingurin varð tikin úr »vraklutunum« í bjargingarvenjingini í gjár*

Mynd: Álvur Haraldsen

*Hetta er antin ein eittari, sum skal í tyrluna beinanvegin, ella ein fýrari, sum vit leggja í eitt horn og ikki gera nakað við*

*Marjus Dam, kommunulækni*



*Tá tyrlan lendi við undirritaða á Triton, varð prioriteturin dempaður heilt niður. – Der er ikke meget, vi kan gøre, segði danski læknin*

Mynd: Eirikur í Jákupsstovu

vil ikki lata eyguni upp.

– Hetta er tann seinasti. Koyr hann í bilin, gevur ein boð um.

### Fast undir ryggi

Føli eitt bump. Hyggi og síggi á eina kvinnu í gulum klæðum. Blundi bara aftur, tí nú veit eg, at okkurt hendir. Pínan verður verri og eri enn meira í ørviti.

Kenni á mær, at okkurt brot manglar. Havi nokk verið burtur við hvørt.

Bilurin steðgar. Hurðin fer upp og eyguni á mær eisini. Síggi fleiri hvítar hjálmar standa uttanfyri.

Teir leggja børuna hjá mær niður á sement.

– Hvat skulu vit gera við hendan?, sigur ein kvinna.

Síggi Marjus Dam. Eg veit, hann er lækni. Endiliga.

### 1 ella 4

– Hann hevur álvarsligan skaða í høvdinum. Hatta er antin ein eittari, sum skal upp í tyrluna beinanvegin, ella er tað ein fýrari, sum vit leggja í hornið og ikki gera nakað við, sigur læknin.

Hoyri tyrluna. Hyggi eftir gólvinum. Síggi eina rúgvu á fólki. Summi rópa framvegis.

Var tað ein deyðadóm Marjus las fyri mær?

Nú lendur tyrlan.

– Marjus. Skal hesin við?, spyr kvinnan.

– Ja, gev honum ein kjans og koyr í tyrluna.

Verði tikin upp og borin. Føli sterkan vind og hoyri larmin av rotorunum á hvítu tyrluni.

Verði settur í tyrluna. Síggi rotorarnar. Vit eru tveir á børu. Hin er pakkaður í staniol og tosar.

### Helst deyður

So lenda vit. Eg veit ikki hvar, men tá eg hyggi meg um, síggi eg, at tað er eitt verjuskip.

Hoyri onkran tosa og síggi eitt danskt flagg á ermuni á ljósabrúnu skjúrtuni.

– Kan du høre mig?

Eg trýsti eitt ljóð úr mær.

Nú kemur ein annar yvir. Hevur stetoskop um hálsin. Helst ein lækni.

– Ham her skal have ilt. Han har stor skade i hovedet, så der er ikke meget, vi kan gøre. Det er en treer, sigur læknin, og skrivar okkurt á pannuna á mær.

Hyggi yvir á síðumannin úr tyrluni. »T3«, stendur á pannuni hjá honum.

So kemur ein yvir, og gevur mær ilt.

Men hann segði, at teir onki kundu gera, so helst eri eg deyður, áðrenn venjingin er av.

Hví flugu teir meg á verjuskip og ikki á sjúkrahús?